# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*-Tað verður borgarakríggj í Libanon, tekur Ísrael seg ikki aftur*

*uttanríkisráðharrin í Qatar*

# Biga Køkar opið aftur

**Í gomlu hølunum hjá HTH á Staravegnum hevur Petur Bech nú latið upp føroyska deild av Biga-køkum**

Handil
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað sæst aftur í býarmyndini, at sethúsabygging og –umbygging hevur fingið nógva ferð seinastu tíðina.

Fleiri nýggir handlar, sum hava við hetta virksemi at gera eru opnaðir, og seinasta skotið í so máta er Biga-køkar, sum í morgun læt dyrnar upp. Serliga eru tað køkar og baðiverisli, sum handilin hevur lagt seg eftir at selja, og hóast harða kapping, so tykist Petur ikki vera í iva um, at virksemið fer at bera til.

- Tað er jú nógv ferð á sethúsabyggingini. Og hóast talan er um fleiri kappingarneytar, so ivast eg ikki í, at rúm eisini er fyri okkum. Vit halda í øllum førum, at vit hava eina góða vøru at bjóða okkara kundum. Og tað ætla vit okkum at liva upp til, heldur handilsmaðurin.

Hann viðgongur annars eisini, at seinastu dagarnir hava verið nakað stressaðir, nú alt skuldi fáast upp á pláss, men tá dyrnar lótu upp mikudagin, var tann parturin av arbeiðinum liðugur.



*Fleiri fólk stukku inn á gólvið, tá nýggi handilin við Biga-køkum læt upp mikumorgunin*

*mynd: álvur*

Garmin tað besta á marknaðinum



Vegvísari til bilin frá 4.595

STUBBIN Fjarðarvegur 12, Vestmanna
Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo www.stubbin.fo

# Norðulendskir marknaðir leggja saman

**Íslendski virðisbrævamarknaðurin, ICEX, er farin undir samráðingar við felagið OMX, sum eigur virðisbrævamarknaðirnar í Danmark, Svøríki, Finnlandi, Estlandi, Letlandi og Litava. Endamálið er at leggja ICEX saman við OMX**

keypsskálar
*www.foroyabanki.fo*

ICEX boðaði fyrr í vikuni frá, at samráðingarnar við OMX snúgva seg um tættari samstarv, men flestu staðni verður fráboðanin frá ICEX tulkað soleiðis, at ICEX ætlar at leggja saman við OMX.

Higartil hevur íslendski virðisbrævamarknaðurin lagt dent á at vera ein sjálvstøðugur virðisbrævamarknaður og hevur samstarvað við OMX um eitt nú SAXESS-handilsskipanina. Men nú tykist kósin vera broytt.

- Vit útihýsa ikki nøkrum møguleika í hesum sambandi, heldur ikki at ICEX leggur saman við OMX, segði stjórin í ICEX, Thordur Friðjónsson, við Børsen fyrr í vikuni.

Í fjør kannaði ICEX møguleikarnar fyri at leggja saman við hinum norðurlendsku virðisbrævamarknaðunum, men valdi at lata vera. Nú hevur ICEX so broytt meining, og orsøkirnar eru sambært stjóranum í ICEX tvær.

Onnur er, at nógvir virðisbrævamarknaðir bæði í Evropa og USA leggja saman. Hin er, at í oktober í ár kemur ein felags partabrævalisti fyri Danmark, Svøríki og Finnland. Tá ICEX í fjør kannaði møguleikarnar at leggja saman, var ógreitt, um øll íslendsk feløg slyppu á hendan listan.

- Nú er greitt, hvussu reglurnar verða, og at øll tey íslendsku feløgini verða við á listanum. Tað er heilt greitt ein stórur fyrimunur fyri íslendsku feløgini at koma við á listan, sigur Thordur Friðjónsson.

Gerst samanleggingin veruleiki, verður Virðisbrævamarknaður Føroya, ið er partur av ICEX, eisini partur av felags norðurlendska virðisbrævamarknaðinum.

Keypssamtøkan í Hoyvík

FK í Hoyvík sóknast eftir

***Fólki at sita við kassan***

at byrja skjótast til ber

Arbeiðstíð:
Mánadag til hósdag 13.30 - 18.45
fríggjadag 13.30 - 19.15
leygardag 9.00 - 15.30
frí annanhvøn leygardag
- í miðal 28 tímar um vikuna

Løn:
Sambært sáttmálan við S & K

Nærri fæst at vita við at venda sær til Bent Lundsgaard, tel 214016

Skrivlig umsókn skal, í seinasta lagi mánadagin 14. august, sendast til

FK Hoyvík
Brekkutúni 9
FO 188 Hoyvík
att: Bent Lundsgaard

# Føgur orð um íslendska búskapin

**Moody's, ið er altjóða viðurkendur greiningar- og kredittmetingarstovnur, hevur júst latið úr hondum nýggja greining um Ísland og íslendsku bankarnar**

Bankar
*www.kaupthing.fo*

Í stuttum er greiningin positiv og staðfestur, at ágangurin, sum herfyri var á Ísland og íslendsku bankarnar, var misvísandi og ógrundaður. Aðrir greinarar taka nú undir við hesum.

Moody's gevur Íslandi framhaldandi kredittmetingina Aaa, ið er hægsta kredittmeting, og um útlitini sigur Moody's, at hesi eru støðug. Hendan kredittmetingin undirstrikar m.a., at íslendski búskapurin er av hægstu góðsku og at ein íløga í t.d. íslendsk statslánsbrøv ber við sær lægsta íløguváða. Um Ísland sigur Moody's, at kredittmetingin tekur støði í, at styrkin á íslendskum virkjum er høg, at almenna skuldin er lág og at íslendski búskapurin í verki hevur víst, at hann er mentur at standa í móti rembingum.

Ísland er eitt ríkt og framkomið ídnaðarland, sum stendur frammanfyri einari búskaparligari spjaðing, sum økir um ríkidømið og menningina av búskapinum. Hóast hetta vísast ávísir tjóðarbúskaparligar ójavnvágir, herundir ein økt skuld í útlendskum gjaldoyra. Hóast hendan skuldin stendst av dygdargóðum íløgum, í somu gjaldoyrum, soleiðis at netto skuldin er avmarkað, var tað m.a. hetta sum elvdi til harða ágangin á íslendsku bankarnar herfyri.

Sambært Moody's var hesin ágangurin yvirdrivin.

- Skuldin í útlendskum gjaldoyra hevur fíggjað útlendskar íløgur av høgari góðsku umframt at ognin og skuldin hjá íslendsku bankunum samsvarar væl.

Moody's sigur víðari, at: "Íslendska fíggjarkervið er vælríkið, væl kapitaliserað við hóskandi gjaldføri og tað er ført fyri at standa ímóti samstundiskomandi ágangi frá ógvusligum broytingum í gjaldoyranum, ognarprísum og ognargóðsku.

- Skuldi ein slíkur ágangur komið, er íslendska stjórnin væl fyri at taka sær av trupulleikunum, orskað at lágu almennu skuldini. Sammett við onnur framkomin ídnaðarlond við høgu kredittmetingini Aaa, er íslendska skuldini bert helvtin av miðalskuldini hjá hinum londunum.